gult cyan magenta svart

Tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov

Marknaðardeild: Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen, Hjørdis Arnadóttir
Blaðfólk: Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Edvard Joensen, Rúnar Reistrup, Dia Midjord, Stefan í Skorini
Ítróttur: Jákup Mørk
Myndamenn: Jens Kristian Vang, Ólvur Haraldsen
Útgevari, uppseting: Sp/f Sosialurin

Bústaður: Argjavegur 26, Argir
Postadr: Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Telefon: 311820 **Fax.** 314720
e-mail: post@sosialurin.fo
Lýsingar: lysing@sosialurin.fo
Prent: P/F Prentmiðstøðin

Saman at standa ei var okkum givið…

Oddagrein

– Vit skulu hava ein sáttmála, sum vit hava ráð at halda, siga nakrir arbeiðsgevarar í hesum døgum, nú starvsfólk á eini matstovu umsíðir hava gjørt vart við, at tey ikki finna seg í sera vánaligu lønarviðurskiftunum, sum flestu matstovur og gistingarhús í Føroym hava at bjóða sínum starvsfólkum.

Í so máta mugu Føroyar vera eitt eindømi. Vit hava fleiri starvsbólkar, ið als ongan lønarsáttmála hava - og vit hava fleiri arbeiðsgevarar, ið siga, at vit ikki skulu hava nakran sáttmála. At hetta hendir í ár 2000 ber boð um, at nógv liggur á láni í okkara samfelag - hesum samfelagnum, sum menn í løtuni geara upp til eitt sjálvstøðugt ríki; eitt land, vit sjáv hava ábyrgdina av…!

Høvdu vit skrivað ár 1900, so hevði hesin veruleikin ikki verið so fjarur - men so átti ikki at verið í dag.

Vit kunnu so royna at finna eina orsøk til hesa primitivu støðu: eru tað arbeiðsgevararnir, ið eru ov harðrendir? Eru tað fakfeløgini, ið ikki kenna sína vitjunartíð? Ella eru tað Palleba og Marsanna, ið finna so í einum og øllum?

Ilt er at taka dagar ímillum. Men eitt er vist, føroyingar hava megnað sera illa at staðið saman um verkafeløgini. Eitt annað er eisini vist: Føroysku verkafeløgini hava megnað illa at staðið saman - og mangan er opið kríggj millum ymsu feløgini. Vit síggja, hvussu klovningur kemur í okkurt landsfelag, sum síðani verður pettað sundur - alt eftir, hvørjir persónarnir eru, sum klandrast. Í øðrum londum hava tey eina landsorganisatión - LO, ið skal virka fyri áhugamálunum hjá øllum fakfeløgunum. Men hetta kemur ikki upp á tal í Føroyum, hóast arbeiðsgevararnir neyvan kunnu lastast fyri tað!!!

Á Café Natúr kanst tú keypa eina øl fyri 50 krónur. Torført er at skilja, at starvsfólkini ikki skulu forvinna meira eina eina góða øl um tíman - og sum eygleiðarar er tað sera ilt at skilja, hví arbeiðsgevarar ikki vilja veita starvsfólkum sínum rímuligar arbeiðsumstøður, sum aftur ber í sær nøgd starvsfólk - og hvat ynskir kundin annað enn tað?

Vónandi fáa verkafeløgini borið so í bandi, at skil fæst á hesi sáttmálaleysu starvsgreinini. Okkum nýtist ikki at uppfinna tann djúpa borðiskin umaftur: Uttan fakfeløg og skipað viðurskifti á arbeiðsmarknaðinum verður einki skil á arbeiðsmarknaðinum…

Sosialurin

Viðmerking:

Íløgur í vinnulív

Nú SVF brúkti míni úttalilsi í samband við Framtaksgrunnin, íløgur og fígging av vinnulívi í Føroyum vil eg loyva mær at gera nakrar viðmerkingar um evni.

Fyri at eingin skal ivast, vil eg siga, at eg meinti tað eg segði, soleiðis sum tað varð sagt, og ikki havi nakað ímóti, at SVF brúkti míni úttalilsi.

Tað hevur altíð verið trupult at fíggja vinnulív í Føroyum. Og tað fer tað eisini at verða nógv ár fram í tíðina. Tað er ymiskt, sum kann gerast fyri at broyta støðuna, men hetta tekur tíð.

Trupulleikin í vinnuni í dag er, at fólk og vinnan annars halda tað verða samfelagsuppgávu hjá peningastovnum, framtaksgrunninum o. l. at lána pengar til vinnulív.

Bankans pengar — okkara pengar

Tað er undarligt, at fólk flest skulu verða av tí uppfatan, at tað er uppgávan hjá peningastovnum og framtaksgrunninum at lána pengar til vinnuna uttan trygd, bert tí at onkur, sum kallar seg vinnulívsmann, ynskir at seta okkurt í gongd. Serliga tá eg hugsi um, at vit øll eru viðskifta fólk hjá peningastovnum.

Fyri at øll skulu skilja, hvat eg meini við, vil eg royna at greiða frá. Peningastovnar umsita pengar hjá palliba o.ø. Fyri hetta skal bankin geva rentu. Fyri at hava ráð til hetta má bankin lána pengar til onkran. Allar útreiðslur bankans skulu gjaldast av muninum á innlánsrentu og útlánsrentu.

Íroknað hesar útreiðslur eru eisini tap av at lána til vinnulívsmenn, sum ikki gjalda lánið aftur. Tá missa peningastovnarnir pengar. Men peningastovnarnir, hvør er tað? Jú, tað er, umframt partaeigararnir, tey sum eiga pening innistandandi, og tey, sum hava lán og gjalda sítt lán aftur. Peningastovnarnir eru noyddir at senda rokningina víðari til sínar kundar. Hetta verður gjørt við at hækka útlánsrentuna og at lækka innlánsrentuna**. Tað eru altíð tey, sum gjalda sítt, sum eisini gjalda fyri tey, sum ikki gjalda.**

Út frá hesum átti tað at verið øllum greitt, at tað ikki er til gagn hjá teimum, sum eiga pengar á bók, ella hjá teimum, sum hava lán, at peningastovnarnir lána pengar uttan at fáa teir aftur.

Peningastovnar ikki at røkja samfelagsuppgávur

Bankin er ein fyritøka, sum skal rekast eins og allar aðrar. Um peningastovnarnir ikki eru kappingarførir, fara allir pengar av landinum, og øll lán koma uttanlands frá, og tað krevur ikki nærri frágreiðing.

Tað er einki sum eitur samfelagsuppgáva hjá peningastovnunum. Samfelagsuppgávur er tað, sum vit velja politikarar at røkja. Og so kunnu javnaðarmenn halda hvat teir vilja.

Somuleiðis er Framtaksgrunnurin ein vinnurekandi grunnur, sum ikki er til fyri at stuðla. Framtaksgrunnurin er ein møguleiki at útvega eginpening og/ella lán á vinnuligum grundarlagi.

Onkur verður glaður fyri noktandi svar

Vónandi fáa hesar reglur onkran at skilja, at tað ikki er uppgávan hjá peningastovnum at lána til hvat sum helst. Í hesum tíðum, tá peningastovnar hava so nógvar pengar, at teir eru um at koma í neyð, trúgvi eg ikki, at tað er ein trupulleiki at fáa lán til skilagóðar ætlanir. Heldur vil eg siga, at teir, sum fáa nei, uttan iva verða glaðir fyri svarið um nøkur ár, tá eygu opnast, og teir síggja, hvussu ivasom teirra ætlan var.

Fyri 15 árum síðan vóru tað fleiri, sum ikki vóru so hepnir.

Eivind Jacobsen
Strendur

Bestu manningarnar mugu sleppa at umboða okkum á Scilly Oyggjunum

Lítið man vera at ivast í, at róðurin framhaldandi er tjóðarítrótt okkara. Um enn fótbólturin veitir mongum viðhaldsfólki, og í hepnum førum eisini allari tjóðini, minniligar løtur, so er tað tó fyri okkum føringar nakað heilt serstakt yvir tí, táið kappróðrarbátarnir við máttmiklum tøkum koma skúmandi borð um borð fram móti mái.

Onkuntíð hevur tað verið havt á mái, at føringar áttu at sloppið at roynt seg í altjóða kappingum við nútíðar kappróðrarbátum. Har mugu vit tó gera okkum greitt, at kappingar á slíkum støði krevja, at kvinnur og menn sessast á róðrartóli alt árið, at ættararvurin við ár í hond tá onki fer at koma okkum til góðar, og at slík professionalisma als ikki kann fáa tann breiða fólksliga týdning, sum róðrarvirksemið á firðum um alt landið hevur í dag.

Men róðrarkapping sum tann, ið Amerada Hess veitti okkara róðrarfólki møguleikan at vera við í á Scilly Oyggjunum er áhugaverd fyri okkum, og úrslitini higartil hava eisini verið okkum til heiðurs.

Oljufelagið A.H. hevur nú latið tað upp í hendurnar á Róðrarsambandi Føroya at skipa fyri føroysku luttøkuni í hesum altjóða kappingum við gomlum 6-mannaðum róðrarbátum, og sum skilst hevur róðrarsambandið sett upp eina reglugerð hesum viðvíkjandi. Men tað, sum hoyrist og sæst um hetta í fjølmiðlunum, fær meg at ivast, um henda reglugerð tryggjar, at tað veruliga verða bestu manningarnar, sum koma at umboða okkum í hesum kappróðri.

Sanniliga unni eg av fullum huga manningini á Frúnni í Miðvági allan heiður fyri tað avrik, tær longu hava framt við sínum nýggja báti. Men at nr. 2 bátarnir í hvørjum bólki skulu avgera, um føroyameistararnir á 5-mannaførunum ella tær á 6-mannaførunum skulu umboða okkum sum róðrartjóð á Isles of Scilly, tað kennist ikki rættvíst. Her eigur enn ein kvalifikatiónskapping at fara fram í bátum av somu stødd, og sum verða mettir at vera eins góðir gongubátar.

Sama er at siga um mansróðurin. Argjabáturin hevur í ár aftur gjørt bragdið at vinna allar róðrarnar nú fram móti ólavsøku og hevur sostatt eina serstøðu millum bátar mannaðir við monnum. Men rættvís verður avgerðin um, hvørjir menn skulu umboða okkum á Scilly, bert, um enn ein kvalifikatiónskapping fer fram millum føroyameistararnar á 6-mannafarinum, seks menn av 8-mannafarinum og seks av 10-mannafarinum.

Ólavur Hátún

Talvan gongur fyri sjómansmissiónini

Komandi sunnudag 23. juli, sum er 5. s.e. trinitatis, er árligi talvudagurin í kirkjum okkara til Hina Føroysku Sjómansmissiónina.

Arbeiðið hjá Hini Føroysku Sjómansmissiónini er eingin »ársungi«, og tí er tað óivað kent fyri flestu føroyingum. Hin Føroyska Sjómansmissiónin hevur eitt stórt virksemi og kunnu vit nevna nakað av tí, sum er hent seinasta árið.

• Gott 400 skip og bátar hava havt vitjan av sjómanstrúboðaranum.

• Øll tey 16 »nýggju« skipini, sum komin eru í føroyska flotan, hava fingið sangbøkur, andaktsbók, lestrabók, sjónbond o. a. umborð.

• Møtir og andaktir hava verið hildin umborð á fleiri skipum. T.d. sjónvarpsmøtið umborð á Vesturvón.

• 20 kvøld vitjaði sjómanstrúboðarin sjómanskvinnuringarnar. Hesi kvøldini vóru ialt 48 sjómanskvinnuringar samlaðir.

• Í mai mánaði upplivdu vit tað gleði, at ITF gav Sjómansmissiónini ein 7 persóns bil. Bilurin verður í høvuðsheitinum nýttur til at vitja skipini við, koyra sjómenn ørindir ella til hús, til møtivirksemi o.a.

Sjómanskvinnuringarnir fáa vónandi eisini gleði av bilinum, tí tá trúboðarin vitjar tær, hendir tað við hvørt, at onkur av teimum ongan bil hevur, so tá bjóðar hann seg at koyra tær til hús.

• Í mai mánaða vóru umleið 200 kvinnur samlaðar til ta árligu kvinnustevnuna í Nesvík.

• Fjúrtan dagar í juni var sjómanstrúboðarin úti á »sildafeltinum« og vitjaði nótaskipini. Hann vitjað 5 skip, og hevði møtir umborð á øllum. Eitt sjónvarpsmøti kemur at vera víst frá hesum túri.

Talvudagurin til Hina Føroysku Sjómansmissiónina hevur stóran týdning fyri arbeiðið og er við til at fíggja ein part av arbeiðinum, sum gjørt verður.

Tað er tí við takksemi, at áheitan verður send til kirkjufólki um ein talvudag. Hjartans tøkk fyri eina og hvørja gávu, sigur Hin Føroyska Sjómansmissiónin.

Gud signi sjófólkið og sjómansmissiónina.

Dýr lomvigaskot

Seinasta leygardag tók sjóverjuskipið Tjaldrið ein útróðrarbát við tveimum monnum, ið skeyt fugl vestan fyri Trøllhøvda. Umframt at hald varð lagt á lomvigaveiði og byrsu, so fáa menninir eisini eina eina dýra bót. Sambært fuglalógini er loyvt at skjóta lunda, lomviga og álku frá 1. oktober til 20. januar.

Hildin aftur

Tað er við ringum tannabiti, at Paul Watson og Ocean Warrior hava ligið til bryggju í Lerwick hesa vikuna. Bretska skipaeftirlitið hevur verið umborð og kanna trygdarviðurskifti í sambandi við, at báturin hevur so nógv ferðafólk. Sambært Paul Watson eru tað danskir myndugleikar, ið hava umbiðið hetta óvæntaða skipasýn.

Fylgir ætlan

Politikommiserurin Uni Vestureið sigur, at løgreglan ikki broytir taktikk, nú Paul Watson er farin at gera film og hevur kendar sjónleikarar við á túrinum. Løgreglan hevur eina ætlan, hvussu atsóknirnar skulu taklast og henda verður fylgd. Kommiserurin sigur, at løgreglan fylgir væl við, hvar Paul Watson og Ocean Warrior ferðast, eisini tá hann er uttan fyri føroyskan sjógv.

Uni Vestureið, politikommiserur

Beinbrot í Góðadali

Um middagsleitið í gjár kom tyrlan hjá sjóverjuni til Havnar við einum manni, ið hevði verið á fjalli í Góðadali. Maðurin var dottin og hevði løstað beinið. Mikudagin varð boð eftir somu tyrlu út í Mykines. Har var ein írsk kvinna dottin og hevði brotið fótin.

Grilla á bryggjuni

Seint fríggjakvøldið kemur norska víkingaskipið Kvitserk á Havnina. Í hesum sambandi verður skipað fyri eini samkomu á bryggjuni eftir døgurða leygdargin, har Pan Fish bjóðar grillaðan laks. Víkingaskipið Kvitserk, ið hevur Ragnar Torseth sum skipara, er á veg til Íslands í sambandi við 1000 ára hald fyri kristnanini.

Loysir seg hóast munin

Hóast munin í avgjaldsskyldu, so kann tað koritni loysa seg at gera íløgur uttanlands

JÁKUP MØRK

Í blaðnum í gjár stóð at lesa, hvussu stórur tann skattligi munurin er, um íløgur verða gjørdar í føroysk ella útlendsk virðisbrøv.

Loysir seg kortini

Millum annað varð í greinini víst á, at meðan rentuvinningur og vinningsbýti verður skattað við 35%, um talan er um føroysk virðisbrøv, verður hetta roknað sum vanlig skattskyldug inntøka, um talan er um útlendsk virðisbrøv.

Eitt, sum ikki kom nóg væl fram í greinini, er, at hóast henda mun í avgjaldsskylduni, so kann tað kortini í fleiri førum loysa seg at seta pening í útlendskar íløgur.

Ein teirra, sum starvast á hesum øki, er Petur Holm, stjóri í Kaupthing. Hann vísir á, at eitt nú rentan á donskum lánsbrøvum er hægri, enn innlánsrentan í føroyskum peningastovnum, og harumframt er eingin munur á avgjaldsskylduni á einum kursvinningi í hesum, so samanlagt gevur hetta eitt stórri avkast, enn um peningurin er í føroyskum peningastovnum.

Verður talan um partabrøv, er møguleikin fyri einum munandi avkasti munandi størri. Her kann talan gerast um avkast við tvísiffraðum prosentsatsum, og so ger tað minni, um skattabyrðan er tyngri. Hinvegin er vágin við partabrøvum sjálvsagt størri enn við lánsbrøvum.

Petur sigur annars, at hóast ein liberalisering á økinum hevði verið til fyrimuns fyri virksemið hjá teimum, so er tó samdur við landstýrismanninum í fíggjarmálum, tá hesin sigur, at farast skal varisliga fram í hesum:

– Sjálvt um føroysku peningastovnarnir í løtuni svimja í likviditeti, so eiga vit so avgjørt ikki at gloyma tað, sum hendi síðst í 80-unum.

Annars framgekk ikki av greinini í gjár, at tá talan er um partafeløg, er líkamikið, um íløgur verða gjørdar innan- ella uttanlands.

Ógreið skattalóg

At enda skal nevnast, at tað í fleiri førum tykist ógreitt í skattalógini, hvussu íløgur í fløgufeløg skulu skattast.

Lóggávan tilskilar ikki serstakt, hvussu íløgur av hesum slag skulu skattast, og tí kann talan í fleiri førum vera um tulkingar av lógini, sum gera seg galdandi.

Fyrst og fremst var tað eisini hesi ógreiðu viðurskifti, sum Karsten Hansen sipaði til, tá hann umrøddi arbeiðið hjá bólkinum, sum í løtuni endurskoðar skattalógini hjá vinnuni, so vónandi verður hetta nakað greiðari, tá viðgerðin av málinum verður liðug.